

*Við nýggju avtaluni við donsku fyritøkuna verður tonstalið økt munandi – og talið av arbeiðsfólkum eisini*

*(savnsmynd)*

# Føroyingar og danir samstarva um sildina

**Kollafjord Pelagic hevði ein marknað í Eystureuropa, men ynskti eisini at koma á tann høgtgjaldandi europeiska marknaðin. Leitingin eftir samstarvsfelagum setti teir í samband við danska fyritøku við drúgvum royndum júst á hesum økinum**

SILD
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Kollafjørður:** - Tað tók sína tíð at fáa hetta í lag. Men nú kunnu vit so av álvara fara til verka!

Soleiðis segði stjórin í Taabbel Fiskeeksport, Viggo Gjødesen Mikkelsen, tá hann fyrrapartin í gjár skrivaði undir eina avtalu um samstarv við Kollafjord Pelagic.

Lagt er upp til eitt spennandi samstarv um framleiðslu av sild, sum tann danski stjórin og tann føroyski stjórin, Dánjal Jákup Andreasen nú fara undir.

Báðir siga teir seg vera sera fegnar um hesa avtaluna, og báðir vænta sær nógv positivt út frá hesum samstarvinum, - einum samstarvi, sum helst fer at gerast enn tættari í framtíðini.

- Møguleikarnir eru nógvir í framtíðini, sigur Mikkelsen, stjórin í Taabbel Fiskeeksport.

- Tí er ikki óhugsandi, at vit t.d. kunnu fara undir at pakka sild í saltlaka, og at foredla aðrar framleiðslur hjá okkum.

Í framtíðini verður helst eisini gjørligt hjá donsku fyritøkuni at keypa seg inn í føroyska felagið.

## Røkka longur út

Avtalan millum fyritøkurnar varð undirskrivað fyrrapartin í gjár í bygninginum hjá Kollafjord Pelagic.

Á stuttari samkomu segði nevndarformaðurin í Kollafjord Pelagic, Sverri Hansen at henda avtalan fer at geva virkinum ein meiri stabilan rakstur í framtíðini.

Virkið hevur havt eina turbulenta tíð, men síðani tað varð endurskipað í 2003 hevur gongdin verið tann positiva vegin.

Teir hava tey seinastu tvey árini lagt seg eftir at heilfrysta sild, og hevur hetta víst seg at rigga væl. Tað sum líkasum vantaði í hjá virkinum í Kollafirði, fyri at røkka enn longur út, var málið at koma niður á tann europeiska marknaðin.

Kollafjord Pelagic hevur í løtuni ein rættiliga góðan marknað í Eystureuropa, men ynskti haraftrat at fáa fatur á londunum vestanfyri. Við hesum í hyggju fóru teir at kanna møguleikarnar fyri at samstarva við aðrar fyritøkur.

## Báðar vegir

Leitingin eftir samstarvspartnarum í øðrum londum førdu teir til samstarvið við Taabbel Fiskeeksport í Skagen.

Sum víst er á aðrastaðni á síðuni, so er hetta ein gomul fyritøka við nógvum royndum við sølu av góðum sildaframleiðslum í Europa.

Í apríl mánaði í ár byrjaðu so samráðingarnar um eina avtalu, og í gjár kl. 10 varð so sáttmálin um eitt framtíðar samstarv undirskrivaður.

- Avtalan skal virka báðar vegir, og tað vísti hon eisini longu undan undirskrivingini í dag, vísti Mikkelsen á.

Um vikuskiftið landaði nevniliga Finnur Fríði 800 tons hjá Taabbel í Skagen, og gav hetta arbeiði til fólkini har alt vikuskiftið.



## Fyrimunir

Báðar fyritøkurnar fáa fyrimunir av nýggju avtaluni:

- Kollafjørð Pelagic kann nú fáa fleiri sildaskip at landa til virkið. Virkið kann frysta 400 tons um samdøgrið, og verður nú ført fyri at skera og frysta 270 tons av norðhavssild um samdøgrið í eitt longri tíðarskeið.

- Taabbel Fiskeeksport fær nú møguleika at lata europeiska marknaðinum eitt størri útboð og breidd av frystum fiski til matna. Tað hevur ikki verið møguligt áður. Drúgvu royndirnar við at skera flak, eins og víða sølunetið í Europa, koma nú eisini til sín rætt. Fyritøkan hevur nógv ár á baki (stovnað í 1948) og hevur eisini gott orð á sær á europeiska meginlandinum.

Talan er tí í roynd og veru um eitt munagott norðurlendskt sildasamstarv, sum røkkur frá bryggjukantinum í Norðuratlantshavi og allan vegin niður á europeiska marknaðin.